# At flyta fakmørk

SIGRUN WARDUM
Vegna Sjúkrarøktaretiska ráðið

Nú landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur úttalað seg um ætlanina at flyta fakmørk og at gagnnýta fakligu kompetensuna hjá sjúkrarøktarfrøðingum, grundað á uppstiging til bachelorar, hava vit í Sjúkrarøktaretiska ráðnum skyldu til at viðgera spurningin og at geva okkara fakliga ískoyti til kjakið.

Aktuellu útsagnirnar hjá landsstýrismanninum benda á, at hann tekur støði í álitinum um framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum, tá ið hann úttalar seg um flyting av fakmørkum.

Álitið er útgivið í apríl 2007 og ein av niðurstøðunum í álitinum er, at vegna trot á læknum og sjúkrarøktarfrøðingum skulu "kvalifiseraðir sjúkrarøktarfrøðingar yvirtaka nakrar funktiónir frá læknunum, og heilsurøktarar taka sær av nøkrum funktiónum, sum sjúkrarøktarfrøðingar vanliga taka sær av" (álit, s. 20, 89 og 117).

Orsøkin til at flyta fakmørk er samansett av mongum faktorum. Ofta er orsøkin øktur eftirspurningur á læknum og sjúkrarøktarfrøðingum, sum millum annað skyldast økt fólkatal, longda livitíð og øktir viðgerðar- og røktarmøguleikar.

Henda flyting av fakmørkum er vælkend í altjóða høpi, men er ofta framd óheft av, at sjúkrarøktarfrøðingar hava bachelorútbúgving. Fyri at kunna virka sum viðgerðarsjúkrarøktarfrøðingur, sum internationala heitið er, krevst harafturat ímóti, at sjúkrarøktarfrøðingurin hevur serútbúgving og drúgvar royndir frá t.d. intensivari deild ella skaðastovu og sostatt er at rokna sum ekspertur.

Royndirnar eru ikki eintýðugt positivar. Um vit nú royna at læra av royndunum hjá øðrum, ístaðin fyri bara at gera sum hini, so eigur eitt viðkomandi orðaskifti at fara fram, áðrenn vit fremja flyting av fakmørkum í verki.

**Lýsing av økinum hjá viðgerðarsjúkrarøktarfrøðinginum í Danmark og Stóra Bretlandi**
Ífylgi Willeman, Vested, Tang (2003) skal motivið til at lata sjúkrarøktarfrøðingar yvirtaka læknaarbeiði, samstundis sum tørvurin á fleiri sjúkrarøktarfrøðingum er eyðsýndur, síggjast út frá motto'inum, at tann best kvalifiseraði røkir tær mest kompleksu og spesiellu uppgávurnar.

Soleiðis vera stundir hjá læknanum at røkja tær kompliseraðu læknaligu avbjóðingarnar, meðan sjúkrarøktarfrøðingurin kann taka sær av teimum minni kompliseraðu. Hinvegin so kann heilsurøktarin taka sær av nøkrum uppgávum, sum sjúkrarøktarfrøðingurin annars plagdi at røkja.

Rapportin "Den behandlende sygeplejerske" (Willeman 2003), sum snýr seg um eftirmeting av framdari flyting av fakmørkum, lýsir økið hjá hesum sjúkrarøktarfrøðingum í Danmark og í Stóra Bretlandi, og kjakast verður um fyrimunir og vansar av flytingini.

Í høvuðsheitum verður fokuserað á 3 hættir at skipa arbeiði:

Á skaðastovum, har sjúkrarøktarfrøðingurin er fataður sum integreraður partur av skaðastovuni ella í sjálvstøðugari klinik í samband við læknamannaða skaðastovu

Skaðaklinik, sum er plaserað á sjúkrahúsi uttan skaðastovu t.v.s. uttan læknamanning, men mannað við sjúkrarøktarfrøðingum.

Heilsumiðstøð, sum er plaserað í lokaløkjum, men mannað við sjúkrarøktarfrøðingum. Afturat smærri skaðum og sjúkum røkir heilsumiðstøðin eisini fyribyrging. Heilsumiðstøðirnar kunnu eisini umfata aðrar fakbólkar, t.d. terapeutar, dietistar og roykiavvenjarar.

Sostatt eru omanfyrinevndu deildir at rokna sum serdeildir, har støðan hjá sjúklinginum er kompleks og ofta krevur skjóta handling. Tí krevur hetta eisini sjúkrarøktarfrøðingar við hægstu kompetensu.

**Royndir við flyting av fakmørkum millum lækna- og sjúkrarøktarfrøðiøki**
Omanfyrinevnda rapport staðfestir, at ensku og fyri so vítt eisini donsku royndirnar við heilsumiðstøðum og skaðaklinikkum mannaðar við sjúkrarøktarfrøðingum eru positivar. Serliga hvat viðvíkur sjúklinganøgdsemi og kliniskum kvaliteti.

Tá tað snýr seg um fígging, so eru viðurskifti sum benda á, at hetta kann vera ein dýrari loysn. Fyri at fáa skaðaklinikk / heilsumiðstøð at virka, er tað eitt krav, at etableringin er lagað til tørvin á staðnum, at kompetensuøkið verður klárt definerað og at sjúkrarøktarfrøðingarnir fáa neyva eftirútbúgving. Tað er serliga eftirútbúgvingin av sjúkrarøktarfrøðingunum, sum ofta vísir seg at koma sum ein óvæntað útreiðsla.

Harafturat vísir tað seg, at skaðaklinikkirnar / heilsumiðstøðirnar verða sera væl vitjaðar. Orsøkin sigst vera, at viðgerðarsjúkrarøktarfrøðingurin gevur sær góðar stundir til hvønn einstakan sjúkling umframt tað, at sjúklinginum hvørki nýtist ávísingarseðil ella tíðarbílegging.

Hesin hátturin at skipa arbeiði gerst tískil eitt eyka tilboð í samfelagnum, har sjúklingarnir eisini venda sær við ørindum, sum teir annars ikki søktu viðtalu fyri.

Í rapportini verður eisini víst á, at læknarnir ikki eru nøgdir við, at fakmørkini verða flutt og eru ikki samdir í, at kvaliteturin í viðgerðunum er nóg góður.

**Royndir við flyting av fakmørkum millum sjúkrarøktarfrøði- og heilsurøktaraøki**
Við í álitinum um framtíðar sjúkrahúsverk er ætlanin, at heilsurøktarar yvirtaka uppgávur hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Ein ørgrynna av kanningum úr Amerika og Stóra Bretlandi vísa, at yvirlivilsisratan hjá sjúklingum økist, at innleggingartíðin styttist og komplikatiónirnar eru færri, tá ið deildin er mannað við høgt útbúnum starvsfólki. (Aiken 2002, 2003), (Stanton & Rutherford 2004). Uppritið frá Joint Commission "Health Care at the Crossroads – Strategies for Addressing the Evolving Nursing Crisis" undirbyggir eisini omanfyristandandi og hevur eina røð av hugskotum / ráðum, sum kunnu bøta um avleiðingarnar av ov fáum sjúkrarøktarfrøðingum.

Tann fyrsti setningurin er at økja upptøkuna av lesandi á sjúkrarøktarfrøðiskúlunum heldur enn at seta størvini við fólki við lægri útbúgving. Samstundis eigur ískoytisútbúgving at verða sett í verk, soleiðis, at talið av sjúkrarøktarfrøðingum á bachelorstigi verður økt. Harafturat skulu leiðslurnar syrgja fyri, at karmarnir eru til at virka undir, tí sum er, flýggja sjúkrarøktarfrøðingar, eisini viðgerðarsjúkrarøktarfrøðingar, úr røktini vegna stress og útbrentheit.

**Samanumtikið kann sigast at:**
Uppstiging av sjúkrarøktarfrøðingum til bachelorar er ætlað at menna hægstu kompetensu innan sjálva sjúkrarøktina og sostatt tryggja sjúklingunum hægsta kvalitet

Flyting av fakmørkum ikki er eintýðugur fyrimunur, hvørki fakliga ella fíggjarliga sæð

Flyting av fakmørkum verður ikki aðra staðni gjørd á vanligum deildum, men bert á lýstu serdeildunum, sum ikki eru skipaðar eftir sama leisti í Føroyum (vit hava bert skaðastovur har sjúkrarøktarfrøðingar eru integreraður partur av starvsfólkamanningini saman við læknunum)

Rátt verður til at økja talið av útbúnum sjúkrarøktarfrøðingum á bachelorstigi

Rátt verður til at karmarnir at virka undir fyribyrgja stress hjá starvsfólkunum.

**Keldur**

Aiken Linda et al (2002), Hospital Nurse Staffing and Patient Mortality, Nurse Burnout, and Job Dissatisfaction, JAMA. 2002; 288:1987-1993 www.nursealliance.ca.org/resources/AikenEtAlRatios2002.pdf" www.nursealliance.ca.org/resources/AikenEtAlRatios2002.pdf , leitidagur: 1. mai 08

Aiken Linda et al (2003), Educational Levels of Hospital Nurses and Surgical Patient Mortality, JAMA. 2003; 290:1617-1623 http://jama.ama-assn.org/cgi/reprint/290/12/1617" http://jama.ama-assn.org/cgi/reprint/290/12/1617 , leitidagur: 1. mai 08

Almanna- og heilsumálaráðið (2007), Álit um framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum HYPERLINK "http://www.ahs.fo/Data/Register/7CE6EDAC-7226-47B4-9FF0-CA56D62761C4/D73280D5-2AC0-43CF-941C-EB538B175B92/70F74435-F174-40BD-981D-5387A541DBD8.pdf" www.ahs.fo/Data/Register/7CE6EDAC-7226-47B4-9FF0-CA56D62761C4/D73280D5-2AC0-43CF-941C-EB538B175B92/70F74435-F174-40BD-981D-5387A541DBD8.pdf , leitidagur: 1. mai 08

Joint Commission on Accreditation of Healthcare Organizations (2003), Health Care at the Crossroads – Strategies for Addressing the Evolving Nursing Crisis, www.jointcommission.org/NR/rdonlyres/5C138711-ED76-4D6F-909F-B06E0309F36D/0/health_care_at_the_crossroads.pdf" www.jointcommission.org/NR/rdonlyres/5C138711-ED76-4D6F-909F-B06E0309F36D/0/health_care_at_the_crossroads.pdf , leitidagur: 1. mai o8

Joint Commission on Accreditation of Healthcare Organizations (2003), Health Care at the Crossroads – Strategies for Addressing the Evolving Nursing Crisis,

Donsk umseting: Krøll Vibeke (2003) www.dsr.dk/dsr/upload/3/0/813/Health_care_at_the_crossroad_-_dansk.pdf" http://www.dsr.dk/dsr/upload/3/0/813/Health_care_at_the_crossroad_-_dansk.pdf , leitidagur: 1. mai 08

Stanton, MW, Rutherford MK (2004), Hospital Nurse Staffing and Quality of Care, Rockville (MD): Agency for Healthcare Reserarch and Quality, Research in Action, Issue 14. AHRQ Pub. No. 04-0029 www.ahrq.gov/research/nursestaffing/nursestaff.pdf" www.ahrq.gov/research/nursestaffing/nursestaff.pdf , leitidagur: 1. mai 08

Willeman Marlene, Vested Stine Hovgaard, Tang Katrine (2003), Den behandlende sygeplejerske DSI Institut for Sundhedsvæsen, København

*Sjúkrarøktaretiska ráðið 02.05.08*

# Steðgið ætlaðu vatnorkuútbyggingum

POUL HANSEN



Til tess at økja el-framleiðsluna frá verandi orkukeldum úr 45% til 55% hevur SEV sett sær fyri at útbyggja vatnorkuna í Dølum og við Víkavatn á Streymoynni og allari eystursíðuni á Vágoynni.

Orsøkin sigst vera at minka um CO2 útlátið.

Samstundis sigur nýggi SEV stjórin í Dimmu nr. 70 frá 11/4-2008 (Punktum.fo) at vit – Føroyar – eru á einum 5. plássi í Europa, hvat viðvíkur el-framleiðslu av varandi orkukeldum.

Hetta prógvar, at okkara el-framleiðsla er ógvuliga "grøn" og at einki er at finnast at henni hesum viðvíkjandi.

Vit skulu minka um CO2 útlátið, men ikki við at útbyggja vantorkuna og seta fleiri av okkara fáu dølum undir vatn ella turrleggja okkara fáu eftirverandi vatnfátæku áir.

Fíggjarliga er tað eisini vitleyst at útbyggja vatnorkuna

Okkara CO2 útlát skal minka og tað fer at minka av sær sjálvum komandi 2 árini, tá heimaflotin verður noyddur at tillaga veiðuorkuna til tilfeingið.

CO2 útlátið fer eisini at minka munandi næstu árini við teimum frambrotum ið henda innan sólkyknur, húsarhaldsmyllum v.m. og vilja minka uppaftur meira um løgtingið frítekur alla slíka útgerð fyri mvg.

Harumframt vilja sparingar í olju/el-nýtslu eisini í stóran mun minka CO2 útlátið.

Lat okkum veruliga seta Føroyar á heimskortið – ikki við at hava fyrrverandi USA forsetar og varaforsetar 1 dag í Føroyum (einki galið í tí) – men við at minka CO2 útlátið á tann hátt, at vit banna allari privatkoyring sunnudag.

Mær kunnugt hava onnur ikki gjørt tað, so hví ikki vera tey fyrstu at gera hetta og í verki veruliga vísa okkara virðing fyri náttúruni í staðin fyri at byrgja fáu livandi áir og dalar okkara aftanfyri betong og asfalt.

Vit megnaðu tað í oljukreppuni 1973 og megna tað aftur um viljin er til tess.

Tað verður heldur ikki verri fyri fólkaheilsuna at fólk ganga og ikki koyar sunnudagar.

# Lívið

Kvinnan er sum ein
frukt
Hør og beisk á
tíðarinna morgni
formar seg til nón.
Vøkur og tekkelig á
kvøldi
saftig og leskilig
tá búnað hon er

***Ishøj***
***2008-04-28***
***h.j.k.Mouritsen***